Blak.

(Serum Butyri).

Eftir Chr. Matras.

Í 1905 gjørdi ALEXANDER BUGGE vart við, at føroyska orðið *blak*, n., »eftirstøðan (mjólkin), tá ið tey hava kirnað« er sama orðið, sum er til skjals í gomlum írskum tekstum, *bláthach*, tí at orðini líkjast so nógv og hava somu merking í báðum málum. Um hetta orðið, í føroyskum, írskum og øðrum málum, og um onnur orð, ið merkja tað sama, skulu vit í stuttum røða her.

Einki norðanmál hevur orð, sum skylt er við hitt føroyska *blak*. Upprunaliga norska navnið á blaki er *saup*, n. (eisini: m. Sí BEITO, 1954, 327). Orðið er av somu rót sum sagnorðið at *súpa* og er av uppruna tað sama sum ísl. *saup*, n., »søbemad, suppe, drikke« (BLÖNDAL). Sbr. eisini svenskt *tjörnesyba* (sí seinni). Men í norskum nú á døgum er í summum dialektum nýtt *kinnemjølk*, og mest í býum *kjernemelk*. Um nýtsluna sigur ALF HELLEVIK mær hetta: »Kor vidt i landet ordet *saup* er brukt i dag, har vi ikkje fullgode opplysningar om, men det synest i alle fall vera den vanlege nemninga over heile Vestlandet frå og med Rogaland, likeins vidare i heile Trøndelag og Nord-Noreg, og dessutan i indre Agder, Telemark, Numedal, Hallingdal, Valdres, Gudbrandsdal, Østerdal (dvs. i alle dalane austanfjells). I kyststroka på Sørlandet, og flat- og kystbygdene på Austlandet og vel òg vanleg i byane er brukt ordet *kjernemelk* (el. -mjølk el. -mjelk). Det er rimeleg at *saup* (til dels) er trengt unna i relativt ny tid av *kjernemelk* (i dial. *kinn(e)mjølk* o.l.).«

Íslendska nevnið á blaki er *á(f)ir*, f.pl., sum fyri 1900 at kalla altíð varð skrivað við ongum »f«. Sum JAKOB BENEDIKTSSON sigur mær frá, vísir tilfarið hjá hini stóru íslendsku orðabókini, at elsta dømið hevur RUNÓLFUR JÓNSSON í málløru síni (1651): »*Aaer* lac qvod segrato Butyro relictum est.« Næstu dømini úr bókum eru frá tíðini eftir miðjuna av 18. øld, og tá kemur orðið ofta fyri. BJÖRN HALDÓRSSON týðir t. d. *áir* soleiðis: »lac butyro emunctum, ebutyratum.« Um upprunan at hesum orði er ilt at siga nakað við skili. Her er nóg mikið at vísa á ALEXANDER JÓHANNESSON (IEW, 21). Um ætlandi samband við eitt orð í Egils søgu (útg. FINNS JÓNSSONAR, 1924, 123; útg. SIGURÐAR NORDALS, 1933, 107), sum skrivað er *afr* (í flestum handritum tó skrivað *afra:* »bar inn a.«), fari eg at vísa á útgávurnar, og á CLEASBY-VIGFUSSON (sí har *áfr*); sbr. eisini HOLTHAUSEN og JAN DE VRIES (sí har *afr*). At orðið í Egils søgu merkir onkun mjólkardrykk, man neyvan vera ivi um. — Burtur úr hini løgnu Króka-Refs søgu (PÁLMI PÁLSSON gav út, 1883, bls. 35) hevur FRITZNER funnið, at *saup*, n., er gamalt íslendskt navn á blaki. Men hetta er neyvan beint — »mér finnst líklegra að það merki *mysu* eða *sýru*«, heldur JAKOB BENEDIKTSSON. — Heldur ikki man tað vera beint, at *þél*, n., sum nevnt er í summum orðabókum, hevur merkingina »blak«. Sí t. d. BLÖNDAL, sum ikki kennir slíka merking. — Eftir øllum tí, sum vit vita, er líkt til, at íslendskt hevur ikki havt annað orð fyri blak enn *á(f)ir*. So statt hava frá fornari tíð tey trý systkinamálini, norskt, íslendskt og føroyskt hvørt sítt navnið á mjólkini, sum eftir er, tá ið kirnað verður.

A donskum eitur blak *kærnemælk* (eisini skrivað: kernemælk), og eingin veit frá øðrum navni at siga har. Orðið er ikki til skjals fyrr enn aftan á 1500. — Nakað um sama aldur er tað elsta dømi, vit hava um tað svenska orðið *kärnmjölk*, høvuðsorðið bæði í ríkismáli og í dialektum. Fyrri partur av hesum orðinum verður ójavnt framborin, sum dialektirnar eru til. Bert í einum lítlum geira (øvre

Österdalarna) er seinni liður ikki *=mjölk*, men *=skyr* (=skör), sum er sama orðið sum íslendskt og gamalt føroyskt *skyr*; blak eitur so har *kirnskyr*. Í marknabygdunum millum Skåne og Småland er til orðið *tjörnesyba*. (Upplýsingarnar um tilfarið í svenskum dialektsøvnum hava teir givið mær: SVEN BENSON, TURE JOHANNISSON og MANNE ERIKSSON).

Í hesum sambandi kann eg nevna, at finska orðið *kirnu* »kirna«, eitt orð, sum helst onkuntíð í miðøldini er komið inn í finskt saman við nýggjum amboði til at gera smør í, samansett við orði, sum merkir »mjólk«, er til í teimum vanligu orðunum har fyri blak: *kirnupiimä* (*piimä* merkir nú á døgum »surmjölk«) og *kirnumaito* (*maito* »mjölk«). Men í øðrum landspørtum (»Östra-Karelien, Impilehti, Suistamo«) er nýtt orðið *pyöhdinmaito*, og hevur, sum ASKO VILKUNA sigur mær, fyrri liður samband við sagnorðið *pyöhtää* »at gera smør (kirna) á gamlan hátt«. (Av somu rót, sigur GUSTAV RÄNK, halda menn estniskt *pett* ella *peti=piim* »blak« vera).

Somu samanseting sum í donskum og svenskum finna vit ymsastaðni í germonskum londum, og óhugsandi er ikki, at fyrimyndin fyri tí danska og svenska orðinum er onkustaðni at finna á europeiska meginlandinum. Í hvussu er ivist eg ikki í, at danskar og svenskar dialektir hava áður havt onnur orð fyri blak, enn tey, sum nú verða nýtt. Samansetingar við »kirnu« og »mjólk« kenna vit úr miðalhátýskum *kërnmilch*, úr miðalniðurlendskum *ke(e)rnemelc* ella *carnmelc* (í Hálandi siga tey nú *karnemelk*) og úr enskum dialektum: *churn=milk* og (skotskt og norðurenskt) *kirnmil(c)k* (1549: kirne=milk).

Summi týsk dialektorð, sum merkja »blak«, eru samansett við orði, sum merkir »smør«. Av *Anke* (fornhátýskt *ancho*) er gjørt *Ankenmilch*. Vanliga týska og enska orðið fyri »smør« er tó *butter* (tað sama sum latínskt *butyrum*), og úr tí er runnið týskt *Buttermilch* (lágtýskt: =melk) og enskt *buttermilk*. Henda samansetingin er nú høvuðsorðið í báðum málum.

Frísamál, bæði fyri norðan og fyri vestan, hava einki orð, sum líkist teimum nevndu týsku ella ensku. Á norður-frísiskum eitur blak *ōne* ella (á Sild) *öörter*, sum PETER JØRGENSEN sigur mær. Í vesturfrísiskum er, sigur J. H. BROUWER, *sûpe(n)* einasta orðið. Viðvíkjandi hesum seinasta orðinum, sbr. norskt *saup*.

Tíverri noyðist eg her at goyma tað tilfarið, sum eg havi savnað úr øðrum málum. Og vit fara nú at spyrja: hvar finna vit hitt føroyska orðið *blak* aftur?

Londini eru hesi: Hjaltland, Orknoyggjar, skotska meginlandið (bæði í geliskum og skotskenskum), Suðuroyggjar og Írland, men ikki Isle of Man.

Vit vita ikki við vissu, um hjaltlendskt *bleddik* og orknoyskt *blatho* (th er her sagt: ð) eru komin úr lágskotskum ella eru forn orð har. Orðið, av fyrstu tíð geliskt, kom tíðliga inn í summar lágskotskar dialektir, elsta dømið í skrift er tó so ungt sum 16. øld *(bledoch)*; úr 18. øld eru dømi úr ymsum landspørtum nevnd í SND. Lágskotsku formarnir eru *blad(d)och, bled(d)och, bladdo* og *bladda*. — Í skotskgeliskum er *blàthach* enn í dag navnið á blaki.

Um orðið *bláthach* í Írlandi havi eg frá C. R. Ó CLÉIRIGH (University College, Dublin) fingið hetta at vita: Orðið er sagt ['bla:həx] (fyri sunnan) ella (fyri vestan og norðan) [bla:x], tað er til í øllum dialektum, og merkingin er allastaðni »buttermilk«. Orðið er sera fornt í írskum, elstu dømini eru úr fornírskum lógtekstum, men um merkingina tá kunnu vit ikki við fullari vissu siga annað, enn at tað merkir eitt slag av mjólk. Dømi (úr fornøld, eisini miðøld):

»1) *Ochtar ocus lemlacht ocus draumce nó bláthach* ('cream and newmilk and skim-milk or buttermilk'), Crith Gablach (lógtekstur tíðliga úr 8. øld, útgivið hevur D. A. BINCHY, 1941), p. 76.

2) *Lite blaithighe no uisce do macuib na ngrad feine* ('stir-about made on buttermilk or water for the sons of the Féine grades'), Ancient Laws of Ireland, vol. ii, p. 148.

3) *ni bu deog de blathaig* ('not a drink of buttermilk'),

Book of Leinster, p. 195, line 36. (Handrit tíðliga úr 12. øld).«

Seinni í tíðini eru dømi í hundraðatali, men hetta fer at vera nóg mikið. Um upprunan at hesum forna írska orði, sum í víkingatíðini sløddist so langt norður sum til Føroya, er at siga, at menn nú eru mest at at halda tað vera drigið burtur úr írskum *bláth* »blomstur« (sbr. latínskt *flos* 'blomstur'), sí Walde-Pokorny II, 176–7. Men slík greiðing er ikki eyðskild, tí, sum C. R. Ó Cléirigh sigur, »the semantics seem rather difficult to understand, and, perhaps more important still, I can think of no other formation quite like *bláthach*«.

Í føroyskum er *blak* einasta gamla orð, sum merkir »mjólk, ið eftir verður, tá ið tey kirna« (*kirnumjólk*, sum tey siga í Havn, er eitt ungt orð, gjørt eftir tí danska »kærnemælk«). Orðið er komið inn í fornføroyskt úr geliskum; sum nevnt vita vit ikki vist, um orðið eisini var til í fornum hjaltlendskum og orknoyskum. Men hvussu verður *bláthach* (blàthach) *blak?* Eg hugsi mær, at orðið í fornføroyskum æt **blaðak*, og tá ið ð í 16. øld datt burtur, varð tað drigið saman í eitt stavilsi. Í víkingatíðini man geliskt th í hesum orði (nú er th sagt h) hava verið framborið sum þ, men slíkt mátti í norrønum broytast til ð. Verri er at greiða, hvussu føroyskt kundi fáa stutt »a« burtur úr longum »á«, tí eitt er víst, at gamalt **bláðak* hevði í føroyskum nú itið **blák* og ikki *blak*. Kanska er her ein ávirkan av tí upprunaliga norrøna føroyska orðinum *blak* »kast«. Men hóast vit ikki kunnu greiða regluliga ljóð fyri ljóð úr geliskum inn í føroyskt, er eingin ivi í tí, at *blak* (um mjólk) er runnið úr tí nevnda geliska orðinum, sum merkir tað sama. – Av teimum keltisku málunum hevur einki hetta navnið á blaki uttan geliskt (í Írlandi og í Skotlandi).

Viðvíkjandi neytum og neytahaldi hava Føroyar onnur orð, sum vísa móti Skotlandi ella Írlandi. Orðið *tarvur*, sum eisini er til í íslendskum, er av geliskum uppruna, *drunnur* (sbr. ísl. drundr) er komið haðani. Merkiligasta

orðið, sum bert er til í staðanøvnum, er fornføroyskt **ærgi*, n., »neythagi, neytamannahús«. Tað varð nýtt í forntíðini í øllum føroyskum sýslum. Hetta orðið (eldri írskt *airge*) bóru víkingar við sær so langt norður sum til Føroya, men ikki til Íslands og heldur ikki eystur til Noregs (tað er til í nøvnum í Vesturonglandi, Hjaltlandi og Orknoyggjum). *Blak* er eitt av teim »neytaorðunum«, sum higar komu í víkingatíðini.

ÍSKOYTI

Kjarni og *kjarnamjolk*.

At kalla í hvørjari etýmologiskari orðabók finna vit eitt fornnorrønt orð *kjarni*, m., »kirna«. Tó er hetta ikki annað enn trøll ella hamur, men av tí at tað hevur vilt so mangan mann, er beinast at royna at reka tað burtur. Maðurin, sum hevur hamað hetta trøllið upp á okkum, er eingin aftari enn JOHAN FRITZNER, sum í stórverki sínum »Ordbog over Det gamle norske Sprog« (1883–1896) sigur okkum, at kirna á norrønum æt *kjarni*, og at blak æt *kjarnamjolk* (sbr. CLEASBY-VIGFUSSON, 775). Nú er fyrst at siga tað, at *kjarni* í hesi merking er orð, sum FRITZNER hevur drigið burtur úr tí samansetta orðinum (»kjarnamjolk«), harafturat er at siga, at blak hevur ongantíð itið »kjarnamjolk«. FRITZNER hevur orðið úr Tómássøgu, týddari søgu (13. øld) um martýrin THOMAS BECKET (1118–1170), har so stendur (útgáva UNGERS, 1869, bls. 447): »hann þarnadiz alla fedu utan kendi litid af *kiarnamiolk*«. Hesin setningurin er neyvan annað enn týðing av hesum orðunum í »De Gestis post Martyrium«[1]): ». . . cibumque . . . praeter *lac amygdalorum* non sumpserit« (hann leskaði ikki annan mat enn mandlumjólk). So statt er — tað er dr. A. B. TAYLOR, sum hevur

[1]) J. C. Robertson, Materials for the History of Thomas Becket, Rolls Series, London, 1885, No. 67, vol. IV. p. 409.

hjálpt mær at finna hetta – »kiarnamiolk« (1. liður: kjarni í frukt) tað sama sum »lac amygdalorum« – og hevur einki við kirnu ella kirning at gera.

SUMMARY

In the paper above a survey is given of the different Scandinavian and other Germanic names for 'buttermilk'. There are no traces of a common word in the Western Scandinavian languages in their older stages, the only surviving older words are Norw. *saup*, n., Icel. *á(f)ir*, f.pl., and Far. *blak*, n. – Alexander Bugge showed (Vesterlandenes Indflydelse, 1904, p. 358) that the Faroese word was borrowed from Gaelic. It is suggested in the present paper that *blak* is derived from **blaðak* (from Gaelic *bláthach*) and contracted to one syllable after the disappearing of ð (in the 16th cent.). It is difficult to explain that the former vowel in the Faroese word is short, but long in the Gaelic equivalent.

In the appendix it is demonstrated that the word *kjarni*, m. 'churn' is a *ghostword*, owing its existence to a wrongly interpreted word in the *Thomas Saga: kjarnamjolk* – corresponding to *lac amygdalorum* (literally 'almond milk') in the Latin source.

BÓKMENTIR

1. *O. Beito:* Genusskifte i nynorsk. Oslo 1954.
2. *Sigf. Blöndal:* Islandsk–dansk Ordbog. Rvk. 1920–1924.
3. *Alexander Bugge:* Vesterlandenes Indflydelse paa Nordboernes og særlig Nordmændenes ydre Kultur, Levesæt og Samfundsforhold i Vikingetiden. Chria 1905.
4. *Richard Cleasby & Gudbrand Vigfusson:* An Icelandic–English Dictionary. Oxford 1874.
5. Franck's Etymologisch Woordenboek der Nederlandsche Taal. Tweede Druk door Dr. N. van Wijk. 1949.
6. *F. Holthausen:* Vergleichendes und Etymologisches Wörterbuch des Altwestnordischen. Göttingen 1948.
7. *Alexander Jóhannesson*: Isländisches Etymologisches Wörterbuch. Bern 1956.

8. *Runólfur Jónsson* = Recentissima antiqvissimæ lingvæ Septentrionalis incunabula Id est grammaticæ Islandiæ rudimenta . . . edita Per Runolphum Jonam, Hafniæ 1651.
9. SND = *William Grant & David Murison:* The Scottish National Dictionary. Edinburgh.
10. *Jan de Vries:* Altnordisches etymologisches Wörterbuch. Leiden 1961.
11. *Walde-Pokorny:* Vergleichendes Wörterbuch der indogermanischen Sprachen. 1927–1932.